## Áhugi fyri íløgum í Grønlandi

Handilsstevnan Mineral Exploration Rpundup, sum júst hevur verið í kanadiska býnum Vancouver, vísti, at áhugin fyri námsvinnumøhuleikunum í Grønlandi er stórur. Summi høvdu væntað, at óvissan á altjóða virðisbrævamarknaðunum fór at avmarka hugin at gera íløgur í námsvinnu, men so var ikki. Tvørturímóti fingu grønlendsku umboðini í Vancouver vissu fyri, at áhugin at gera íløgur í grønlendsku námsvinnuni er stórur, skrivar Sermitsiaq.



*Tað er stórur áhugi fyri at gera íløgur í grønlendska námsvinnu*

# Íverksetan – er tað nakað nýtt?




HUGLEIÐINGAR
*Elin Heinesen, stjóri í SamViti*

Fleiri løgtingsvalevni nevndu undan valinum tørvin fyri íverksetan og íverksetararáðgeving. Hetta er at frøast um, tí hetta er alneyðugt. Men ein kann undrast á, hví íverksetararáðgeving varð umrøtt sum eitt heilt nýtt fyribrigdi her á landi. Sannleikin er, at nógv gott er at byggja víðari á, tí fólk hava leingi arbeitt miðvíst fyri íverksetan í Føroyum.

Hóast nýhugsan og íverksetan eiga at fáa væl betri sømdir enn nú, mugu vit ikki gloyma, at fólk hava arbeitt við stuðli og ráðgeving av íverksetarum í mong harrans ár. Hetta arbeiði eigur at verða viðurkent, tí tað hevur givið góð úrslit, sum vit kunnu byggja á framyvir. Íverksetaravirksemi er ein inngrógvin partur av føroyska hugburðinum og íverksetarahugurin er væl longri frammi í Føroyum enn í londum, vit samanlíkna okkum við. Hetta vísa hagtølini.

### Føroyar frammanfyri Danmark og USA

Føroyingar stovna prosentvíst væl fleiri fyritøkur um árið enn onnur lond. Í Danmark liggur talið uppá 10 prosent, í Bretlandi uppá 14 prosent og í Føroyum omanfyri 17 prosent um árið! Í Føroyum er virkni og virkishugurin á høgum støði. Hugsa bara um, hvussu skjótt føroyingar bardu seg úr kreppuni fyrst í 90'unum. Og tað gongur lutvíst væl við búskapinum í Føroyum í løtuni.

Hetta merkir tó ikki, at vit kunnu lena okkum afturá og hvíla á laurberjabløðunum. Okkara vinnulív er ikki nóg fjølbroytt, og vit hava tí enn ein sera viðkvæman búskap. So vit mugu gera tað enn betri. Tað er tí avgjørt einki galið við at tosa fyri meira íverksetan. Tað er innlýsandi, at vit alla tíðina hava brúk fyri at menna og fjølbroyta føroyskt vinnulív fyri at tryggja okkum betri til framtíðina. Tí er tað avgerandi neyðugt at raðfesta íverksetan og íverksetararáðgeving høgt politiskt.

### Eldsálir gjørt megnararbeiði fyri íverksetan

Tað, at íverksetan er ein partur av føroyska hugburðinum – og at áræðið til íverksetan er so lutvíst umfatandi í Føroyum júst nú – er m.a. eisini úrslit av einum miðvísum arbeiði, sum hevur verið gjørt av eldsálum langt aftur í tíðina. Íverksetan er og hevur leingi verið ein partur av føroysku fólkasálini. Føroyingar eru ómetaliga uppfinnsamir og hava stórt áræði. Vit hava verið noydd til at hava áræði og vera uppfinnsom í einum so avbjóðandi umhvørvi, sum Føroyar eru, um vit skuldu yvirliva á hesum harðbalnu klettum. Men aðrar søguligar orsøkir eru eisini til, at føroyingar eru so íverksetanarhugaðir.

Vit minnast t.d. Ídnaðarfelagið, Tormóð Dahl og ídnaðarstovuna. Ídnaðarstovan bleiv síðani til Menningarstovuna, har Kjartan Kristiansen í 20 ár hevur gjørt eitt megnararbeiði fyri at stimbra og menna nýggjar vinnur í Føroyum – ofta í stríðum mótvindi. SamVit heldur á við hesum arbeiði og hevur í dag eina Menningardeild við 5 fólkum, sum arbeiða miðvíst fyri at stimbra íverksetaravirksemi í Føroyum.

Hyggja vit longur aftur ella breiðari út í samfelagið finna vit aðrar eldsálir. Vinnulívsfólk og einstaklingar (t.d. Hans Mortensen við Sundsdeplinum, sum tíanverri ongantíð bleiv veruliggjørdur), arbeiðsgevarafeløg, bankar, skúlar og onnur í Føroyum hava eisini gingið undan í at stimbra íverksetan. Tað hevur bara ikki altíð itið 'íverksetan' og 'íverksetarar'. Íverksetarar hava t.d. verið kallaðir 'finna-uppámenniskju' og íverksetan hevur verið kallað 'menning', 'nýskapan', 'innovation' og mangt annað gott.

Seinastu árini hevur íverksetarahúsið Bitland víst ein úrslitagóðan leist við at bjóða íverksetarum eitt íblásandi stuðlandi umhvørvi at arbeiða í. Bitland og SamVit hava gjørt samstarvsavtalu um, at Bitland skal hýsa Klekingardeplinum, sum er ein verkætlan undir SamViti. Hetta íverksetarahús satsar serliga uppá íverksetarar, sum ynskja vøkstur, og sum vilja hava allan heimin sum marknað. Bitland og Klekingardepilin hýsa í dag fleiri fyritøkum, sum klára seg væl, og eru í stórum vøkstri.

### Gott politikkarar endiliga vilja stuðla íverksetan

Men tað mesta, sum higartil hevur verið gjørt á íverksetararáðgevingarøkinum, hevur hvílt á einstaklingum, og almenni stovnurin, sum varar av málinum, SamVit, hevur ikki verið raðfestur so høgt áður á fíggjarlógini. Tað, sum hevur væntað í, er ein miðvís langtíðar ætlanarlegging av íverksetararáðgeving í øllum landinum, samstarv og ein betri yvirskipað samskipan av ráðgeving til íverksetarar, so vit fáa ymisk tilboð undir ein hatt – og ikki minst ein munagóð almenn fígging til hetta.

Tað gleðiliga hóast alt við, at íverksetan og íverksetararáðgeving nú er komið á dagsskránna, er, at nú verður ljós varpað á evnið, so vit kunnu viðgera tað í tí álvara, tað hevur uppiborið. Knappliga er tað vorðið nakað, sum politikkarar og onnur fegin vilja taka undir við og stuðla, har tey, sum fyrr brendu fyri slíkum, tíanverri ofta ikki vórðu tikin eins nógv í álvara sum nú. Tey máttu arbeiða 'uppá tross' og ofraðu nógv fyri at halda lív í teirra lívs verkætlanum. Tey gjørdu eitt megnar forarbeiði, sum eingin orsøk er til at blaka burtur. Ístaðin fyri at byrja heilt av nýggjum, so latið okkum viðurkenna og taka til eftirtektar, hvat gott vit frammanundan hava



*Tormóður Dahl*



*Kjartan Kristiansen*